## Kafka á Meiarínum

Ein Kafka-inspirerað uppseting, nevnd »Investigations of a Dog« verður framsýnd hesa vikuna á Meiarínum. Frumsýning var í gjárkvøldið og hildið verður fram vikuna út. Talan er um sang og dansleik, og Tróndur B. Hansen hevur komponerað tónleikin., meðan Rannvá Káradóttir og Carly Best hava koreograferað.

## 50 ár síðan Góðanes

2. januar vóru liðin 50 ár, síðan íslendski trolarin Góðanes sigldi á Flesjarnar á veg inn á Skálafjørðin eftir síni føroysku manning. Tað vóru 24 mans umborð. Allir bjargaðust uttan tann 23 ára gamli skiparin Pétur Hafsteinn Sigurðsson (myndin). Í hesum sambandi verður minningarhald á Strondum sunnudagin. Byrjað verður við kirkjugongd í Sjóvar kirkju kl 11. Kl 15 verður minnissteinur um skiparan avdúkaður við minnisvarðan á Strondum. Aftaná bjóðar sjómanskvinnuringurin á Strondum til ein drekkamunn í missiónshúsinum, har øll eru vælkomin. Tað koma átta gestir úr Íslandi, og er hetta ættin hjá skiparanum.

# 100.000 partabrøv eftir tveimum minuttum

**Fyrstu løtuna, Føroya Banki varð skrásettur á børsinum í Íslandi og Danmark, var ógvuliga lívligur handil við partabrøvunum, og kursurin reyk frá 189 upp á 240 fyrsta minuttin**

PARTABRØV

*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*




*Fólk hugdu spent at skíggjanum, meðan Thordur Friðjónsson greiddi frá, hvat fyrifórst*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Spenningurin var stórur millum leiðslu, starvsfólk, grunn og ráðgevarar bankans eins væl og onnur hjástødd, tá Føroya Banki klokkan ellivu í morgun varð skrásettur á fyrsta sinni á børsunum í Íslandi og Keypmannnahavn.

Tað fall stjóranum á íslendska børsinum, ICEX, Thordur Friðjónssoni, í lut at greiða frá og vísa fyri teimum hjástøddu fyrstu handlarnar við Føroya Banka partabrøvum.

Íslendski stjórin greiddi annars fyrst frá gongdini í Íslandi og segði millum annað, at privatiseringin av bankunum í Íslandi vóru avgerandi orsøkin til fíggjarliga framburðin í landinum seinastu tíggju árini.

- Bankarnir hava havt avgerandi týdning í fíggjarligu broytingini frá lokalum til globalan búskap, segði Thordur Friðjónsson.

Fíggjarsektorurin vaks frá 55% av BTÚ fyri fimm árum síðani til 230% í dag, og er nú lutfalsliga ein av heimsins størstu.

Talið á skrásettum fyritøkum er fallið munandi, men tær sum eru til í dag, er afturfyri munandi sterkari eisini á altjóða marknaðinum, og einki av hesum hevði kunna hent uttan privatisering og børsskrásetting.

### Lívligur handil

Klokkan ellivu føroyska tíð precis opnaði børsurin fyri handli av partabrøvum hjá Føroya Banka. Og meðan fólk spent stardu av stórskíggjanum, sum bankin hevði sett upp til endamálið, byrjaði aktiviteturin út fyri teirri linjuni, har navnið Føroya Banki stóð. Tað gingu ikki nógv sekund fyrr enn fyrsta boðið kom, og stutt eftir var fyrsta útboðið eisini á skíggjanum.

Alt hetta er jú spildurnýtt, men handilin gongur eftir øllum at døma soleiðis fyri seg, at tey, ið ynskja at keypa partabrøv notera til hvønn kurs tey vilja keypa, meðan tey, ið bjóða út, á sama hátt boða frá, hvønn kurs tey vilja hava. Og so er bara at »prutta«.

Og áhugin var ovurstórur at handla, tí í sínari stuttu røðu kundi umboðið fyri børsinum í Keypmannahavn, Carsten Borring, upplýsa, at fyrstu tveir minuttirnar, Føroya Banki var skrásettur, vóru handlað 100.000 partabrøv.

Sum minuttirnir gingu, stabiliseraði kursurin seg á umleið 230, sum kortini er væl hægri enn tekningskursurin upp á 189.

Fleiri røður vóru sum vera mann hildnar, men hóast hetta var ein søguligur dagur fyri í fyrsta lagi Føroya Banka, men so sanniliga eisini fyri Føroyar sum heild, var bert hin eini landsstýrismaðurin at síggja til hátíðarhaldið, og tað var Vinnumálaráðharrin, Bjarni Djurholm.

Spennandi verður í hvussu er at fylgja gongdini komandi dagarnar, tí ikki fyrr enn ein tíð er liðin sæst, í hvørja legu kursurin fer at leggja seg. Stóru lopini eru nevniliga púra vanlig, tá ein fyritøka á fyrsta sinni verður børsskrásett.

# Smábýtt til íleggjarar

**Smáu íleggjararnir fingu sítt, men nógvir nýggir partaeigarar fingu nakað nógv minni, enn tey høvdu sett sær fyri**

EINSKILJING

*Jákup Mørk*

Býtislykilin, sum varð nýttur, tá partabrøv í Føroya Banka skuldu býtast millum privatu íleggjararnar, gav ikki rúm fyri teimum heilt stóru partabrævakeypunum.

Sum tað framgongur á myndini, so sluppu privatir íleggjarar í mesta lagi at keypa partabrøv fyri á leið hálvthundraðtúsund krónur. Og uttan iva eru tað heilt nógv, sum høvdu sett seg fyri meira enn hetta.

| Tekning | Tryggjað | + 2% av | Samlað keyp |
|---|---|---|---|
| 10.000 | 10.000 | 0 | 10.000 |
| 25.000 | 11.340 | 13.660 | 11.613 |
| 50.000 | 11.340 | 38.660 | 12.113 |
| 75.000 | 11.340 | 63.660 | 12.613 |
| 100.000 | 11.340 | 88.660 | 13.113 |
| 250.000 | 11.340 | 238.660 | 16.113 |
| 500.000 | 11.340 | 488.660 | 21.113 |
| 1.000.000 | 11.340 | 988.660 | 31.113 |
| 1.500.000 | 11.340 | 1.488.660 | 41.113 |
| 2.000.000 | 11.340 | 1.988.660 | 51.113 |